Hyundai Getz kosin "Årets Bestseller"

Millum 20 tey mest seldu bilmodellini í Danmark bleiv Hyundai Getz 1,3 við 5 hurðum valdur sum tann mest økonomiski bilurin at koyra í.
Tað sæst á tænastusíðuni www.bilpriser.dk, sum eisini hevur kosið Hyundai Getz til "Årets Bestseller 2003"

Prísir úr BERT 118.750,-

FÆST EISINI SUM DIESEL



FÆST NÚ EISINI SUM VAN 99.750,- v/mvg

Bilurin uttan: Snøggar linjur allan vegin runt! Hyundai Getz fær fólk at venda sær á í ferðsluni.
Eingin ivi er um at Getz er ein fragd fyri eygað og tekur seg væl út í føroyska landslagnum.
Hesin eleganti bilurin rúmar lættliga 4 vaksnum persónum, gott pláss er til beinini og høgt til lofti .
Tú kennir altíð Hyundai Getz aftur í ferðsluni við t.d. síðuspeglunum í sama liti sum bilurin, smartum juvel-baklyktum, og eini útstráling framman sum vísir á ætlanina hjá Hyundai við hjá Getz'inum: FRAMFÝSNI VIÐ STÍLI!

HONDA | NORÐBIL | ŠKODA Volkswagen Group | HYUNDAI

BOX 1070 · OYGGJARVEGUR · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 313707 · FAX 310855



Kvinnukvøld á Hotel Føroyum



Forkela teg sjálva!
Lekkurt kvinnukvøld verður á Hotel Føroyum
leygarkvøldið 13. november
tí nýtt damublað kemur út.
Dyrnar verða stongdar kl. 19.30 stundisliga!

**20:00 - Fyrsti partur**
Vælkomin, Lena L. Mohr, *blaðstjóri á Kvinnu*
Hugleiðing, Elin Winther Poulsen, *journalistur í ÚF*
Mótasýning
Sjónleikur, *Birita Mohr og Súsanna Tórgarð framføra stuttan sjónleik*
Mótasýning
3 dansarar frá Ljósinum

**21:00 - Steðgur**
Pinnamatur og eitt glas av víni / djúsi
Stundir til hugnaligt prát

**22:00 - Annar partur**
Hugleiðing, Bjørt Samuelsen, *journalistur á Kvinnu*
Mótasýning
Lena & Niclas spæla og syngja
Mótasýning
Takk fyri, Lena endar

**23:00 - Liðugt**

***Allar fáa eitt eintak av blaðnum Kvinnu***

Prísur: kr. 300,-
Avmarkað atgongd - so skunda tær!
KEYP ATGONGUMERKI Á
**WWW.KVINNA.FO**



kvinna



Áarvegur 4-10 • Postsboks 107 • FO-110 Tórshavn
Telefon 31 32 33 • Fax 31 52 50 • hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo

NJÓTIÐ VIKUSKIFTIÐ Á Hotel Hafnia

*Restaurant Hafnia*
SUNNUDAGSDØGURÐI
KL. 12:00 – 17:00

3-rættirs matarskrá
» Rækjublund
» Fleskasteik
við hvítum og brúnkaðum eplum, reyðkál og soðsós
» Bananasplit



*Bíleggið borð á tlf. 31 32 33*

| | |
|---|---|
| Høvuðsrættur | kr. 145,- |
| 2 rættir | kr. 165,- |
| 3 rættir | kr. 175,- |
| Børn 2 – 12 ár | 1/2 prís |

HOTEL HAFNIA

*Hotellið í miðbýnum*




# Samstarv um bústaðarpolitikk

**Norðurlendsku ráðharrarnir í bústaðarmálum hava í vikuni tingast um størri bústaðarpolitiskt samstarv**

BÚSTAÐARPOLITIKKUR
*Jákup Mørk*

Fyri Føroyar var Hans Pauli Strøm á fundinum, og ráðharrarnir vóru á einum máli um, at bústaðarpolitiskt samstarv er av stórum áhuga fyri øll trý londini. Altso Ísland, Føroyar og Grønland.

Eitt nú verður bæði í Føroyum og í Grønlandi arbeitt við bústaðarpolitiskum átøkum, ið hava til endamáls at gera bústaðarmarknaðin fjølbroyttari.

Tá talan er um ein skipaðan bústaðarpolitikk, er ein tann størsti trupulleikin tað sera avmarkaða hagtalstilfarið, ið er til taks. Ongin bústaðarteljing er gjørd í Føroyum síðan 1977, og íslendska og grønlendska hagtalstilfarið er eisini avmarkað. Fyri at bøta um hetta, skal gerast við eini felags verkætlan, sum Ísland skal standa fyri. Farið verður í holt við fyrireikingarnar skjótast gjørligt.

Føroyski landsstýrismaðurin í bústaðarmálum, fegnast um, at londini í Útnorðri eru samd um at taka stig til hesa felags verkætlanina.

– Føroyska arbeiðið við bústaðarpolitikki hevur næstan verið gjørt í blindum, tí ongi hagtøl eru til taks. Nú ætla vit bæði at gera eina fólka- og bústaðarteljing, og ein dátugrunn, sum kann viðgera úrslitini av teljingini og sum lættliga kann haldast við líka, verður millum annað ssagt í tíðindaskrivi, sum er sent føroysku miðlunum.

# Fundast um okkara eldru

**Føroya Kommunufelag fer saman við kommununum í Bodø í Noregi og Luleå í Svøríki um vikuskiftið at umrøða, hvussu vit í Føroyum kunnu skipa okkara eldraøkið á skilabestan hátt**

Føroya Kommunufelag er í hesum døgum vertur fyri stýrisfundum hjá verkætlanini "Okkara Lív sum Eldri". Talan er um eina verkætlan, sum Føroya Kommunufelag samstarvar við kommununum Luleå í Svøríki og Bodø í Noreg. Umboð fyri hesar kommunur eru eisini við á fundinum, sum verður hildin á Hotel Hafnia í Havn.

Í tíðindaskrivi frá Føroya kommunufelag verður sagt, at endamálið við verkætlanini er at fáa til vega vitan og stýringsamboð, sum kunnu nýtast til at skipa eldraøkið í framtíðini á skilabestan hátt. Kommunurnar í Bodø og Luleå hava drúgvar royndir at fyrisita eldraøkið, bæði tá tað snýr seg um rakstur og útbyggingar.

Á fundinum um vikuskiftið standa Sundalagið, Leirvík, Vestmenna, Eirargarður og Tórshavnar Ellisheim á breddanum

**-páll**

# Fimta Sølurásin

**Árliga sølustevnan á Skála, SøluRásin, verður hildin hetta vikuskiftið.**

SØLUSTEVNA
*Jákup Mørk*

Tað eru Skála Ítróttarfelag, Skála Róðrarfelag, Stranda Ítróttarfelag og Strálan, sum skipa fyri tiltøkini.

Í ár eru liðin fimm ár síðani, at feløgini tóku seg saman um at skipa fyri eini felags árligari sølustevnu. Stevnan hevur øll hesi árini verið stak væl vitjað. Bæði av framsýnarum og gestum. Somikið væl hevur hepnast, at tað ikki hevur verið neyðugt hjá feløgunum at lýsa eftir framsýnarum, og nógv av teimum, sum eru at síggja, hava gingið aftur hvørt árið.

Tað verður Annita á Fríðriksmørk, sum í ár setir stevnuna, og dagarnar, sum stevnan verður hildin, verður eisini nógv undirhald av ymsum slag at síggja og hoyra. Eitt nú verða Magni Christiansen, Jóhan í Kollafirði, Jens Marni og Kim á pallinum, umframt at tvær mótasýningar eisini verða fyriskipaðar.

Bæði kvøldini verður drigið millum atgongumerkini um vinningar, og sunnukvøldið verður so høvuðsvinningurin millum hesar drigin.

# Fríða á Brekku í Smiðjuni

Í gjár lat Fríða Brekku framsýning upp í smiðjuni Lítluvík, har hon sýnir fram akvarellir, grafik og smáir skulpturar. Fríða Brekku er útbúgvin á seminarium fyri håndverk og design í Nørresundby í málarí og grafik. Hon hevur verið við á nøkrum felagsfrámsýningum í Danmark og á Várframsýningini og á Olavsøkuframsýningini í Listaskálanum. Hetta er fyrsta separatframsýning hennara. Frámsýningin er opin til mikudagin 10 nov. Hvønn dag kl. 14 - 18


Bilfríðkan



Vit hava fleiri brúktar bilar til sølu
BARA GÓÐAR BILAR

Prísur úr kr. 16.000,- til 1/2 millión krónur

Opið er leygardagin frá kl. 10 til 16

Verið vælkomin inn á gólvið til ein kaffimunn

Bilfríðkan á Hjalla
Tel 35 73 00 ella 21 73 00
landsins lagaligasta brúktbilafígging





BJARTI MOHR
Tórshavn, fyrst og fremst
- ein góð kommuna fyri øll

XA
FÓLKAFLOKKURIN